# Væleydnaður Bachfagnaður

**Í døgunum 25. og 26. juli varð skipað fyri tónleikafagnaði í Vági og tað var Bach, ið stóð á skránni. Tiltakið eydnaðist væl og Claus Telling, fyrireikari, vísir ikki aftur, at talan kann vera um líknandi tiltøk í framtíðini. Ætlanir eru longu um ymisk tónleiktiløk í heyst**



*Bachfagnaðurin í Vági fyri ólavsøku eydnaðist stak væl og kann vera byrjanin til fleiri tiltøk av sama slag*
*(Mynd: D. Olsen)*

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Bachfestivalurin, sum var í kirkjuni í Vági fyri ólavsøku, var ein roynd. Og royndin eydnaðist væl, sigur Claus Telling, stigtakari.

Claus telling er tónleikari. Kona hansara, Marianne Telling, er prestur í Vági og Claus starvast sum urguleikari, mentanarmedarbeiðari og tónleikalærari. Hjúnini og trý børn teirra komu til Føroya fyri lítlum ári síðani.

Ein Vinmaður Claus úr tónleikaumhvørvinum í Keypmannahavn, Søren Johannsen, er vanur at loysa av sum urguleikari í Havnar kirkju. Tá Claus frætti, at Søren var ávegis til Føroya, stakk hugskotið um eitt samstarv seg upp. Og Bachfagnaðurin sá dagsins ljós. Við sær hevði Søren danskar tónleikarar. Eisini føroyskir leikarar vóru við. Søren Johannsen er annars kendur úr metbókum, tí hann hevur spælt allar urgukonsertirnar hjá Bach út í eitt.



*Stásiligt klaver, ið stendur mát, er í Stóra Pakkhúsið í Vági, so væl ber til at hýsa tónleikatiltøkum. Longu nú eru ætlanir um konsertir seinni í heyst*
*(Mynd: D. Olsen)*

### Væl eydnað

Suðuroyar Sparikassi og Vágs Kommuna stuðalu tiltakinum. Og hóast neyðugt var hjá tónleikarunum at spýta í sjálvir, fyri at fáa tiltakið til veruleika, so eru teir í dag væl nøgdir.

– Tað eydnaðist væl. Serliga kona mín, Marianne, gjørdi eitt stórt arbeiði hesar dagarnar, sigur ein væl nøgdur fyrireikari.

– Roknað var ikki við tí heilt stóra og tað er eini ein framíhjárættur at sleppa at leika Bach, hóast tað er krevjandi. Tað krevur sítt, t.d. fleiri tónleikarar og harvið fígging. Hetta er serstakur tónleikur, sigur Claus Telling.

– Tónleikur er mest skrivaður sum cafétón-leikur til undirhalds. Men tó er hann kirkjukendur, sigur Claus Telling.

Konsertir vóru um dagin og á kvøldi. Um dagin vóru ikki so nógvir áhoyrarar, men til kvøldkonsertirnar vóru eini 80 fólk, sum má metast at vera nógv.

– Tað riggaði væl og fólk vóru væl nøgd, so væl, at vit kundu helst hildið á at leikt, og ikki givist, skemtar Claus, ið fegnast um góðu undirtøkuna.

Ætlandi skuldi Kirkjukórið Ljómur taka lut, men kórið var í útlondum á sangferð.

– Hetta er eitt slag av pionerarbeiði. Kanska royna vit aftur. Og tá verða vit kanska betur fyri og ávegis nakkað fyrri og møguliga ber eisini til at ferðast við slíkum tiltaki, sigur Claus Telling.

### Onnur tiltøk

Ætlanir eru tó um mong tónleikatiltøk seinni í ár. Eitt teirra er, at Ljómur syngur eina kantatu efftir Bach. Men verður líknandi tiltak aftur, sum Bachfagnaðurin, so skal Ljómur luttaka, sigur ein væl nøgdúr Claus Telling.

Í næstum hevur hann ætlanir um eitt kvøld í Stóra Pakkhúsi í Vági. Talan verður um solokonsert, har Chopin stendur á skránni. Pakkhúsið hevur fingið stásiligt klaver, ið stendur mát við tað ið krevst til konsertir á høgum støði, so tað er gaman í at skipa fyri tónleikatiltøkum har.

Konsertin við tónleiki eftir Chopin verður ætlandi seinni í august.

# Listastevnan í Gallarí Oynni

**Listastevnan hevur tiltøk uttanfyri høvuðsstaðin og hósdagin 8. august letur upp framsýning í Gallarí Oynni á Tvøroyri, har Preben Boye og Zakarias Heinesen sýna fram**



*Gallarí Oyggin á Tvøroyri er partur av Listastevnuni 2002. Hósdagin letur upp sýning við Preben Boye og Zakarias Heinesen*
*(Mynd: D. Olsen)*

LIST
*Dagfinn Olsen*

Listastevnan 2002 er í hæddini. Norðurlandahúsið er karmur um flestu tiltøkini, men eisini kring landið gongur ymiskt fyri seg.

Hósdagin letur upp framsýning í Gallarí oynni á Tvøroyri, ið vanliga samstarvar við Norðurlandahúsið. Talan er um myndhøggaralist og málningalist.

Tað eru Preben Boye og Zakarias Heinesen, ið sýna fram. Zakarias Heinesen kenna vit sum ein av okkara fremstu núlivandi listarmonnum. Hann sýnir fram bæði úti og heima, og málningar hansara eru væl dámdir og ganga sum heitt breyð. Málningar hansara eru eyðkendir. Sagt hevur verið, at hann við list síni málar flótandi oyggjar. Og hóast hann, sum flestu í sínum ættarliði, nýtir føroysku náttúruna sum myndevni, so flytir hann seg og hann er egin.

Preben Boye er millum fremstu myndahøggarar í Danmark. Hann er føddur í Reykjavík í 1944 og er útbúgvin verkfrøðingur. Hann heldur til í Torup í Danmark. Hann hevur havt sýningar í Danmark og í Føroyum, og eisini hevur hann havt sera nógvar uppgávur at prýða bygningar og annað. Hann sýnir fram list úr bronsu og gróti.

Gallarí Oyggin, sum Palle Julsgart rekur, fegnast um at hava fingið slíka vitjan. Ferniseringing er hósdagin klokkan 15. Framsýningin er opin frá 8. august til 8. september.



*Høggmynd eftir Preben Boye*



# Tindur tikin í stongdum øki

**Vaktarskipið Tjaldrið kom sunnukvøldið á Havnina við trolbátinum Tindi, sum hevði fiskað í einum stongdum øki**

FISKISKAPUR
*Stefan í Skorini*



*Tindur av Strondum kom sunnukvøldið á Havnina, eftir at Tjaldrið, sum liggur aftanfyri, hevði tikið bátin í einum stongdum øki*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Trolbáturin Tindur varð sunnukvøldið tikin fyri at fiska í einum stongdum øki. Tað var vaktarskipið Tjaldrið, sum kom fram á bátin, og tók hann við sær á Havnina, har skipini løgdu at klokkan hálvgum ellivu.

Tindur, sum er heimahoyrandi á Strondum, royndi í stongda økinum, sum nevnist D2. Hetta økið liggur vestanfyri Suðuroynna og er innanfyri tólv fjórðinga markið. Tá Tjaldrið kom fram á bátin hevði hann trolið úti, so skiparin er tikin uppá feskan gerning.

Økið er opið frá 31. mai til 8. juli á hvørjum ári, men stongt restina av árinum. Tindur er ein av teimum trolbátunum, sum fær loyvi at fiska innanfyri tólv fjórðingar um summarið.

Mánadagin á middegi hevði skiparin framvegis ikki fingið sektaruppskot, men tá var hann skuldsettur fyri ólógligan fiskiskap.

173 nýggj grundøki í Hoyvík:

# Størsta útstykking í Føroyum

**Í næstum fer Tórshavnar Býráð at biðja byggifeløg um tilboð uppá arbeiðið at gera klárt til 170 nýggjar bústaðir í Hoyvíkshaganum. Býráðið skal standa fyri arbeiðnum, so at húsaeigararnir sleppa undan einum parti av meirvirðisgjaldinum**

BYGGING
*Stefan í Skorini*




*Soleiðis fer Hoyvíkshagin at síggja út, tá 170 nýggir bústaðir eru bygdir. Arbeiðið at gera klárt verður væntandi boðið út í næstum*

Tórshavnar Býráð fer í næstum undir størstu útstykking í Føroya søgu. Klárt skal gerast fyri 173 nýggjum bústøðum í Hoyvík. Talan er um 130 vanlig grundøki, har eitt sethús verður á hvørjum. Síðani skulu 43 randarhús ella sambygd hús, sum tey eisini verða nevnd, byggjast afturat.

### MVG

Rúni Leitisstein er formaður í eigarafelagnum Hoyvíkshagin Suður. Hann vónar, at byggifeløg kunnu fáa útbjóðingartilfarið sum skjótast, so at farast kann undir byggingina.

Eigarafelagið og býráðið hava ætlanir um at leggja byggingina soleiðis til rættis, at tað er býráðið, sum fer at standa fyri byggingini. Orsøkin til at tað ikki er eigarafelagið, sum stendur fyri byggingini, er, at eigarafelagið ikki kann fáa MVG afturgoldið. Tað kann býráðið hinvegin, og tí er tað bíligari hjá teimum, sum byggja, at býráðið stendur fyri arbeiðnum.

– Vit bíða eftir svari frá Toll- og Skattstovu Føroya. Hon skal geva endaliga góðkenning fyri, at býráðið kann standa fyri byggingini, og soleiðis sleppa vit undan einum parti av meirvirðisgjaldinum, sigur formaðurin.

Advokatar og revisorar hava orðað eitt uppskot um, hvussu hesin leisturin skal síggja út. Væntandi fáa eigarafelagið og býráðið grønt ljós frá Toll- og Skattstovuni um at farast kann til verka.

Ætlanin var upprunaliga, at eigarafelagið skuldi standa fyri byggingini, men tá tey varnaðust, at tey skuldu rinda fult MVG, vendu tey sær til býráðið og heittu á tað um at standa fyri byggingini.

Nú fær býráðið endurgoldið tríggjar fjórðingar av meirvirðisgjaldinum, og hetta kemur sum vera man sera væl við hjá teimum, sum hava ognað sær grundøki í hesi útstykkingini.

### Øll seld

Øll tey 130 grundøkini eru longu seld, og eigararnir bíða nú eftir, at arbeiðið skal fara í gongd. Tey 130 grundøkini eru 300, 400 og 500 fermetrar til støddar.

Tey 43 randarhúsini eru enn ikki seld. Orsøkin til hetta er, at býráðið ikki hevur kunnað ásett ein fastan prís fyri húsini. Tí hava fólk ikki viljað bundið seg til at keypa húsini frammanundan.

Ætlanin er nú, at lata privatar byggiharrar um at byggja randarhúsini, og teir skulu síðani sjálvir syrgja fyri at selja tey. Lítil ivi er tó um, at eingin trupulleiki verður at sleppa av við tey, tá prísurin einaferð verður fastlagdur.

Enn er øki bara hagi, men skjótt verður tað ein býlingur. Tilboðið, sum byggifeløg fara at lata inn, umfatar gerð av vegi, gongubreytum, kloakk, streymi og telefonneti.

Tá hetta arbeiðið er liðugt, kunnu teir einstøku eigararnir av grundøkjunum fara í gongd við at byggja húsini.

Ætlanin er aftanfyri ta upprunaligu tíðarætlanina, men Rúni Leitisstein heldur tó, at projektið hevur gingið væl. Hann vísir á, at tað er umráðandi at loysa trupulleikarnar beinanvegin, heldur enn at koma í rasshaft av teimum seinni.